# Vegleiðing til skrásetingarskjalið til Vinnuskránna

*Skrásetingarskjalið til Vinnuskránna skal undirskrivast av ábyrgdarleiðara hjá virkinum og skal latast TAKS í viðkomandi øki **í seinasta lagi 8 dagar**, áðrenn farið verður undir virksemið. Tá ið virkið er skrásett, verður eitt skrásetingarprógv sent virkinum yvir tær skyldur, sum tað er skrásett við.*

*Tú kanst heinta skrásetingarskjalið her ella á www.taks.fo > Oyðubløð > Vinnuskrá.*

## Vegleiðing til teigarnar í skrásetingarskjalinum

### 1. Virki

Her verður upplýst, hvør skal skrásetast í vinnuskránni, t.e. navn, bústaður o.s.fr.

### 2. Virksemi

Byrjanardagur er tann dagur, tá ið farið verður undir virksemið, sama um fólk er sett í starv ella ikki.

### 3. Virkið skal skrásetast við fylgjandi skyldum

Her skal boðast frá, um virkið er mvg-skyldigt ella lønhæddaravgjaldsskyldigt, og nær skyldan byrjar. Boðast skal eisini frá, um virkið skal vera lønávísingarskyldigt. Undir øðrum skal sigast frá, um aðrar skyldur eru, t.d. framleiðslugjald og útflutningsloyvi.

**Meirvirðisgjald**

Virkið skal bert mvg-skrásetast, um tað er vinnuligt sambært § 1 í mvg-lógini. Ein málsviðgeri hjá TAKS viðger í hvørjum einstøkum føri, um so er. Til at fáa rætta málsviðgerð, er ofta neyðugt at lata inn eina rakstrarætlan.

Virkið skal vanliga gjalda mvg hvønn ársfjórðing, eisini kallað avgjaldstíðarskeið. Virkið fær eina mvg-uppgerð fyri hvønn ársfjórðing og skal lata hana inn aftur og avrokna í seinasta lagi ein mánað og 10 dagar eftir endan á einum avgjaldstíðarskeiði. Tó er innlatingarfreistin fyri 2. ársfjórðing 24. august.

Uppgerðin skal altíð latast inn aftur, eisini um hon vísir 0.

Skal avgjaldstíðarskeiðið broytast, skal virkið søkja um tað við oyðublaði M16: Umsókn um vikuavrokning av meirvirðisgjaldi ella M18: Umsókn um mánaðaravrokning av meirvirðisgjaldi. Trýst á leinkini ella heinta oyðubløðini á www.taks.fo > Oyðubløð > Meirvirðisgjald (Mvg).

**Lønhæddaravgjald**

Løgtingslóg nr. 193 frá 10. desember 1993 um lønarhæddaravgjald ásetir í § 1, at summi virkir, ið lata tænastur fyri samsýning, hava skyldu til at gjalda lønarhæddaravgjald til landskassan. Talan er um:

- læknavirksemi, tannlækna- og annað dentalvirksemi, kiropraktikk, fysioterapi og aðra autoriseraða heilsurøkt,
- tryggingarvirksemi og
- bankavirksemi, sparikassavirksemi og fíggjarvirksemi.

**Lønávísari, arbeiðsgevaragjøld og ómaksgjald**

Tá ið eitt virki flytur starvsfólki løn, áliggur tí eisini at gjalda til m.a. Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Barsilsgrunnin. TAKS sendir virkinum rokning fyri hesi gjøld umvegis Mínrokning, sum er ein rokningaskipan hjá Elektron. Bræv við innritingarupplýsingum til skipanina verður sent virkinum eftir fyrstu lønarflyting. Vil virkið stovna sjálvvirkandi flytingar fyri rokningar frá TAKS, kann tað gerast á Mínrokning á www.minrokning.fo.

# Vegleiðing til skrásetingarskjalið til Vinnuskránna

## 4. Virkisháttur

**Einstaklingsvirki**

Navn og p-tal hjá handhava skulu upplýsast á skjalinum. Handhavin skal undirskriva tað. Rakstrarætlan fyri eitt 12 mánaða skeið skal eisini sendast okkum. Verður mett, at munandi broytingar vera í virkseminum komandi árini, er skilagott at gera rakstrarætlanina fyri tvey til trý ár. Heinta dømi um rakstrarætlan her ella undir snarslóðum á www.taks.fo > Kunning til serligar bólkar > At stovna virki.

**Íognarfelag**

Navn og p-tal hjá øllum íognarum skulu upplýsast. Er eitt felag íognari, skal v-tal upplýsast. Oyðublaðið skal undirskrivast av øllum íognarum ella av teimum, sum hava tekningarrætt. Avrit av íognarsáttmála og rakstrarætlan fyri eitt 12 mánaða skeið skulu leggjast við. Verður mett, at munandi broytingar vera í virkseminum komandi árini, er skilagott at gera rakstrarætlanina fyri tvey til trý ár. Heinta dømi um rakstrarætlan her ella undir snarslóðum á www.taks.fo > Kunning til serligar bólkar > At stovna virki. Ein íognarsáttmáli skal upplýsa navn, bústað, endamál felagsins, eigarar, og hvussu nógv hvør eigari eigur í felagnum í prosentum. Sáttmálin skal somuleiðis dagfestast og undirskrivast av øllum eigarum.

**Íverksetarafelag**

Navn og p-tal hjá øllum stovnarum skulu upplýsast. Er eitt felag stovnari, skal v-tal upplýsast. Við skulu leggjast stovningarsamtykt, eigarabók, viðtøkur felagsins, avrit av fráboðan um nýskráseting frá Skráseting Føroya og rakstrarætlan. Rakstrarætlanin skal fevna um eitt 12 mánaða skeið. Verður mett, at munandi broytingar vera í virkseminum komandi árini, er skilagott at gera rakstrarætlanina fyri tvey til trý ár. Heinta dømi um rakstrarætlan her ella undir snarslóðum á www.taks.fo > Kunning til serligar bólkar > At stovna virki. Skrásetingarskjalið skal undirskrivast av øllum stovnarum ella av teimum, sum hava tekningarrætt.

**Partafelag og smápartafelag, ið eru skrásett hjá Skráseting Føroya**

Skrásetingarskjalið skal undirskrivast av stjóra felagsins ella teimum, sum hava tekningarrætt. Viðtøkur, eigarabók, avrit av fráboðan um nýskráseting frá Skráseting Føroya og stovningarsamtykt skulu leggjast við.

**Útlendsk virkir**

Sambært mvg-lógini og lóg um lønhæddaravgjald skulu útlendsk virkir, ið reka avgjaldsskyldigt virksemi her á landi, og sum ikki hava deild ella líknandi her, skrásetast við einum persóni, sum býr her, ella við einum felagi, sum hevur heimstað her. Undantikin eru virkir, ið fyri tað mesta bara selja til føroysk virkir, sum so kunnu rokna avgjaldið við í sítt inngangandi avgjald.

Umframt upplýsingar um útlendska virkið skal fráboðanin eisini innihalda upplýsingar um umboðið í Føroyum, m.a. p-tal ella v-tal. Útlendska virkið skal undirskriva skrásetingarskjalið, og umboðið í Føroyum skal undirskriva oyðublaðið M06: Umboð í Føroyum vegna útlendskt virki – skuldbindingarreglur. Trýst á leinkið ella heinta á www.taks.fo > Oyðubløð > Meirvirðisgjald (Mvg).

**Lutafeløg**

Skrásetingarskjalið skal undirskrivast av ábyrgdara felagsins. Við skal leggjast undirskrivaður lutafelagssáttmáli.

**Partafelag og smápartafelag undir stovnan**

Navn og p-tal hjá øllum stovnarum skulu upplýsast. Er eitt felag stovnari, skal v-tal upplýsast. Viðtøkur, eigarabók og avrit av stovningarskjalinum skulu leggjast við. Skrásetingarskjalið skal undirskrivast av øllum stovnarum ella av teimum, sum hava tekningarrætt.

# Vegleiðing til skrásetingarskjalið til Vinnuskránna

**Samløgufelag (kommandittfelag)**
Navn og p-tal hjá øllum stovnarum skulu upplýsast. Er eitt felag íognari, skal v-tal upplýsast. Skrásetingarskjalið skal undirskrivast av øllum íognarum ella av teimum, ið hava tekningarrætt. Legg avrit av samløgusáttmála við.

**Aðrir virkishættir**
Til aðrar virkishættir hoyra m.a. deyðsbúgv, trotabúgv, útlendsk partafeløg, deildir av útlendskum feløgum, onnur útlendsk feløg, brúkarafeløg, feløg við avmarkaðari ábyrgd, keypsfeløg, framleiðslu- og sølufeløg, tryggingarfeløg, akkumulerandi íløgufeløg, sjálvsognarstovnar, sjálvsognarstovnar við almennum studningi, sparikassar, grunnar og stovnar.

## 5. Ítøkilig frágreiðing um, hvat virkið ger

Her skal ítøkiliga sigast, hvat virkið fæst við. Dømi: Ráðgeving innan leiðslu, bókhald, søla av kioskvørum, nethandil við bundnum pløggum, umvæling av teldum o.s.fr. Eru fleiri vinnugreinar, so skal eisini upplýsast, hvør høvuðsvinnugreinin er.

## 6. Eigarar, ábyrgdarar o.a.

Her verður upplýst, hvør eigarin er (ella eru, um teir eru fleiri). Upplýsast skal eisini, um talan er um einstaklingsvirki, íognarfelag, partsreiðarí ella annað, har v-talið er knýtt beinleiðis at einum ella fleiri likamligum persónum. Fyri juridiskar persónar verður upplýst, hvør hevur heimild til at binda felagið/felags-skapin móti TAKS. Fyri útlendskt virkir, sum skulu mvg-skrásetast, skal upplýsast, hvør skal vera mvg-umboð.

Høvuðspartaeigari er tann persónur, sum innan fyri tey seinastu fimm árini sjálvur ella saman við teimum persónum, sum niðanfyri eru nevndir í brotinum "Útgreining av orðinum høvuðspartaeigari", hevur átt 25% ella meira av partapeninginum ella hevur havt ræði á meira enn 50% av atkvøðuvirðinum.

**Útgreining av orðinum høvuðspartaeigari**
Tá staðfestast skal, um einhvør er høvuðspartaeigari, skulu teljast uppí tey partabrøv, sum eru ogn hjá hjúnafelaga, foreldrum, ommum, abbum, børnum, barnabørnum og hjúnafeløgum teirra ella deyðsbúgv eftir hesar persónar. Teljast skulu eisini uppí partabrøv, sum hoyra til feløg, har nevndu persónar hava havt avgerandi ávirkan orsakað av partabrævaogn, viðtøkum, avtalum ella felags leiðslu.

Partabrøv, ið fyrrverandi hjúnafelagi hjá omanfyrinevndu persónum hevur átt, verða ikki uppítald. Tað verða heldur ikki partabrøv, sum núverandi hjúnafelagi hjá omanfyrinevndu persónum hevur selt áðrenn giftuna.

## 7. Vinnugluggin

Vinnugluggin er sjálvgreiðsla, sum vinnulívið brúkar til at avgreiða fleiri av viðurskiftum sínum við TAKS á netinum. Vinnugluggin er fyri øll, sum hava v-tal. Ein skal vera brúkari, fyri at nýta tænastuna. Les meira um hetta á [www.taks.fo/vinnugluggin](www.taks.fo/vinnugluggin).

**Møguleikar í Vinnugluggанum**
Í Vinnuglugganum ber til at avgreiða mvg-uppgerðir, tollingaráheitanir og tollrokningar. Eisini ber til at rætta áður innlatnar mvg-uppgerðir. Síggjast kunnu eisini grundupplýsingar, lønaryvirlit og kontuavrit. Á kontuavritunum sæst, hvat fellur til gjaldingar hvønn 28. í mánaðinum. Soleiðis kann virkið halda seg dagført um kontuviðurskifti síni, eins og hvørt tað fær innlit í, hvørjar upplýsingar, TAKS hevur um tað.

Øll virkir skulu lata inn sjálvuppgávu og roknskap á Vinnuglugganum.

# Vegleiðing til skrásetingarskjalið til Vinnuskránna

## 8. Grannskoðaraatgongd til Vinnugluggan

Virki kann geva grannskoðara ella bókhaldara atgongd til Vinnugluggan hjá sær. Tá fyllur ein út oyðublaðið VG03: Fráboðan um at geva ella strika grannskoðara-/bókhaldaraatgongd til Vinnugluggan. Trýst á leinkið ella heinta á www.taks.fo > Oyðubløð > Vinnuskráin.

## Skyldur í sambandi við rættingar og broytingar í vinnuskránni

**Adressur o.a.**

Rættingar og broytingar av adressum o.ø. hjá virkjum *skulu* fráboðast vinnuskránni. Tað er ikki nóg mikið at boða Fólkayvirlitinum frá. Til at rætta og broyta adressur o.a. nýtir ein oyðublaðið V01: Skrásetingarskjal til Vinnuskránna og setur kross útfyri "broytingar av verandi skráseting". Trýst á leinkið ella heinta á www.taks.fo > Oyðubløð > Vinnuskráin.

**Uppathald og avhending**

Broytingar, ið viðvíkja uppathaldi/avhending av virksemi, *skulu* fráboðast innan 8 dagar, áðrenn broytingarnar taka við. Til tess nýtir ein oyðublað V10: Frámeldingarskjal til Vinnuskránna. Trýst á leinkið ella heinta á www.taks.fo > Oyðubløð > Vinnuskráin.

Gev gætur, at feløg, ið eru skrásett hjá Skráseting Føroya, mugu venda sær hagar við uppathaldi og avhending. TAKS strikar ikki slík feløg uttan fráboðan frá Skráseting Føroya.

## Lógargrundarlagið undir hesum skrásetingarskjali

Skrásetingarskjalið til vinnuskránna verður nýtt til at skráseta virksemi og til at broyta skráseting sambært:

- mvg-lógini,
- lóg um lønhæddaravgjald
- skattalógini, §§ 120 og 125
- kunngerð nr. 88 frá 30. mai 1994 um upplýsingarskyldu sambært skattalógini viðvíkjandi rentum o.ø.
- bókhaldsskyldulógini
- øðrum lógum og kunngerðum

Allar navnnevndar lógir og kunngerðir eru at finna í lógasavninum hjá TAKS á www.taks.fo/lógasavn og á www.taks.fo > Lóg.

## Okkurt at spyrja um í sambandi við hesa vegleiðing?

Set teg í samband við kundatænastuna hjá TAKS á tel. 35 26 00 ella á taks@taks.fo. Vit vegleiða fegin.